Leikrit



Krubbuspælið

Landsmiðstøðin

Krubbuspælið

Skrivað og sett saman: Anna Sofía Restorrf og Sólmundur Joensen (1986)

Leikarar:

Frásøgufólkið/Upplesarin:

Augustus:

Maria + barn:

Jósef:

Hirðar:

Vísmenn:

Einglar:

Feit skrift:	frásøgufólk
Vanlig skrift:	replikkir
Skráskrift:	*rørslur og umstøður á pallinum*

Nú birtast túsund jólaljós
í hesi myrku stund
og túsund onnur glógva nú
á himna bláu grund

Og yvir bý og land í kvøld
fer jólaboð av stað,
at føddur Harrin Kristus er.
Tí eru vit so glað.

Tú stjørna yvir Betlehem
á lat títt milda ljós
nú lýsa inn við friði og vón
í vára heim og hús.

Í hvørt eitt hjarta, tungt og myrkt,
tín glæma lýsi blíð,
ein glæma av Guds kærleiks lind
í hesi jólatíð!

Frásøgufólk: *"Men tað hendi í teimum døgum, at tað komu boð frá Augustus keisara um, at allur heimurin skuldi verða skrivaður í manntal!"*

Augustus: „EG, Augustus keisari, ynski, nú meðan Kvirinius er landshøvdingi í Sýriulandi, at allur heimurin skal verða skrivaður í manntal!! „

Frásøgufólk: *„Og øll fóru at verða skrivað, hvør í ættarbygd sína. Men eisini Jósef fór úr Gallileu úr bygdini Nasaret, niðan til Júdeu, til Dáv-*

ids bygd, sum eitur Betlehem, av tí at hann var slektaður av Dávids húsi og ætt, at verða skrivaður, saman við Mariu, trúlovaðu festarmoy síni, sum var við barn.
Men tað hendi, meðan tey vóru har, at tíðin kom, at hon skuldi eiga barn. Og hon átti son sín, hin fyrsta fødda, og hon reivaði hann og legði hann í eina krubbu, av tí at ikki var rúm fyri teimum í tilhaldshúsinum."

Eitt barn er føtt í Betlehem,
tí gleðir seg Jerusalem.
Halleluja, halleluja.

Ein fátæk kona mamma er,
hon lítið barn í fangi ber.
Halleluja, halleluja.

Tó høllin ei var stór og von,
hon goymdi himsins kongason.
Halleluja, halleluja.

Frásøgufólk: *„Og tað vóru hirðar har í sama bygdarlagnum, sum lógu úti á markini um náttina og goymdu at seyðafylgjum sínum. „*

Tað sótu seyðamenn á vakt,
og goymdu sínar smalur.
Alt fylgið hevði stilt seg lagt.
Ei lamb í líum spælir.
Sjálvt varnir hundar durva smátt.

Í dølum valdar dimma nátt.
Um heimin Harrans friður.

Frásøgufólk: *„Og sí, eingil Harrans stóð hjá teimum, og dýrd Harrans ljómaði rundan um teir, og teir vóru ógvuliga óttafullir.*
Og eigilin segði við teir: Óttist ei, tí sí, eg kunngeri tykkum eini stór gleðiboð, sum skal verða fyri alt fólkið „

Ein frelsari nú føddur er.
Í dag til tykkum sendur.
Hin Harri Krist hann navnið ber.
Í Dávids stað - ókendur.
Men prógv fullgott tit skulu fá:
Í fjósi lágt á krubbu strá.
Eitt lítið barn tit finna .

Brátt syngur einglaflokkur blítt:
"Halleleluja, hosianna;
Guds friður yvir verøld vítt.
Og heiður veri Himladrott"
Men hiðarnir sær skunda brátt.
Sín frelsara at skoða.

Frásøgufólk: *„Men tá ið Jesus var føddur í Betlehem í Júdeu, á døgum Heródisar kongs, sí, tá komu nakrir vísmenn úr Eysturlondum til Jerusalems og søgdu:*

Vísmaður: *„Hvar er hin nýføddi Jødakongurin? Tí vit hava sæð stjørnu hansara har eysturi, og vit eru komnir at tilbiðja hann.*

Tá ið ein stjørna bjørt og blíð
sjónlig var um náttartíð
skuldi føðast kongur stóri
so var søgnin, og tí fóru
vísmenn tríggir beint avstað

Tó teir ikki vistu hvar
hesin kongur føddur var,
stjørnan bjarta, himlaljósið,
vísti teimum beint á fjósið
har sum Jesusbarnið lá.

Frásøgufólk: *„Og sí, stjørnan, sum teir høvdu sæð har eysturi, gekk framman undan teimum, líka til hon kom og stóð yvir har, sum barnið var. Og teir fóru inn í fjósið og sóu barnið hjá Mariu, móður síni, og teir løgdust á knæ og tilbóðu tað, og teir lótu upp goymslir sínar og bóru tí gávur".*

1. Vísmaður: Her er gull
2. Vísmaður: Her er myrra
3. Vísmaður: Her er roykilsi

- - - - -

Frásøgufólk: „Tað fór at kvølda. Tað var farið um niðurfaringartíð; og so við og við hvurvu ljósini úr gluggunum í bygdini.
Bert Jósef sat uppi enn. Hann setti seg í náttarkvirruna at hugsa . . . . Hann hugsaði um jólaundrið í Betlehem"

Øll ganga út.

Tá ið vísmennirnir ganga, verður sagt:

Frásøgufólk: "Fót fyri fót ganga vísir menn
gjøgnum hitt náttardøggaða land,
málleysir enn av undrinum har
- tigandi, glaðir, sum droymandi børn"

"Háligi herur av stjørnum lær.
Søtan sova móðir og barn.
Undrandi vála nú ellismenn,
vísmenn tríggir í djúpari nátt."